# Dusinið er fult hjá ÍF



*Martin Tausen og hinir í FC Suðuroy fingu einki frá Nenad Saric og ÍF*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**VODAFONEDEILDIN** Tað hevur gingið væl hjá ÍF hesa vikuna, har teir hava fingið fult í tveimum dystum, og nú veruliga eru har, sum tað er stuttligt at verða

skrivari

| | |
|---|---|
| ÍF | 2 |
| FC Suðuroy | 0 |

Fyribils kunnu fuglfirðingar leggja niðurflytingarprát á hillina, aftaná tvey góð avrik farnu vikuna, fyrst ímóti AB á útivølli sunnudagin, og síðani ímóti FC Suðuroy á heimavølli ígjár. Í fyrra hálvleiki vóru møguleikar til bæði liðini. Tá eitt stórt korter var farið skeyt Obi Charles eitt langskot, sum smeyg sær beint við síðunnar av stongini. Løtu seinni stútaði Kaj Ennigarð ÍF framum, tá hann beindi eitt frí-spark frá Karl Løkin í málið. Karl sjálvur, Andy Olsen og Dánjal á Lakjuni høvdu møguleikar at økja um leiðsluna áðrenn steðgin. Í hinum endanum hevði Jákup Mikkelsen nakrar fepurbjargingar, tá FC Suðuroy hevði ein duppultan málmøguleika. Ì fyrra hálvleiki fangaði miðvøllurin hjá ÍF fleiri bóltar, og fingu teir soleiðis í fleiri førum byrgt fyri FC Suðuroy álopum. Ein strika í rokningini var tó, at liðskiparin hjá ÍF, Poul Ennigarð mátti av vølli, tá 40 minuttir vóru farnir, tí hann hevði beglað.

## Nógvir málmøguleikar

Tað vóru nógvir málmøguleikar í seinna hálvleiki, har ÍF átti heldur fleiri av teimum. Tað var tó bert ÍF, sum fekk úrtøku í seinna hálvleiki. Tá 69 minuttir vóru farnir høvdu Fritleif í Lambanum, Áki Petersen og Øssur Dalbúð eitt framúrskarandi samanspæl, sum endaði við, at Øssur spældi Nenad Saric leysan, og megnaði serbin at skjóta bóltin fram við Stanislav Kuzma í FC Suðuroy málinum til 2-0. Seinastu løtuna spenti FC Suðuroy veruliga álopsbogan fyri at koma aftur í dystin, og hetta gav málmøguleikar í báðum endum. Nenad Saric meddaði eitt skot á yvirleggjaran hjá FC Suðuroy ímóti dystarenda, og í yvirtíðini megnaði Kaj Ennigarð at rudda eina atsókn hjá Obi Charles burtur á sjálvari málstrikuni.

## Góður dystur

Poul Ennigarð hjá ÌF helt, at talan var um ein góðan dyst, men hann var ivaleysur í, at sigurin hjá ÍF var fult uppiborin. – Vit høvdu nógvar málmøguleikar, og eg haldi eisini, at vit spældu betur enn FC Suðuroy. Teir høvdu sjálvandi eisini vandamiklar málmøguleikar, men eg haldi, at vit høvdu fleiri málmøguleikar, segði Poul Ennigarð aftaná dystin. Liðskiparin hjá ÍF, sum mátti út, tí hann beglaði veit ikki við vissu at siga, um hann verður klárur til dystin ímóti HB sunnudagin. Henning Joensen hjá FC Suðuroy helt eisini, at talan var um ein góðan dyst. Men hann er ikki samdur við Poul Ennigarð, at ÍF var betur leikliga enn FC Suðuroy. – Bæði liðini royndu veruliga at gera sítt besta. Sjálvur haldi eg, at fyrri hálvleikur var øðiliga javnur, men í seinna hálvleiki eru vit í fleiri tíðarskeiðum væl betur, og tað hevði als ikki verið óuppiborið, um vit vóru omaná, ella høvdu fingið javnleik, segði Henning Joensen aftaná dystin. Tey køldu fakta'ini eru tó samd við Poul Ennigarð. Tvey mál og trý stig til ÍF, og einki hjá FC Suðuroy at taka við sær umborð á Smyril.

# HB rennur skjótari enn hini

**UPPTAKT 8. UMFAR** Um spenningurin ikki skal verða minkaður heilt nógv, tá ið fyrsti triðingurin av kappingini verður liðugur, so er tað neyðugt, at fuglfirðingar og B36 fáa bilbukt við meistarunum

Jonhard Hammer

Í 7. umfari gekk tað soleiðis, sum tað hevur gjørt fleiri tær seinastu ferðirnar: HB vann tepran sigur, og millum tey, sum renna aftan á meistaraliðnum, vóru tað fleiri, sum kiksaðu.

Sunnudagin verður 8. umfar á skránni, og tá ið 9. umfar verður avgreitt 2. hvítusunnudag, sum er annan mánadag, verður fyrsti triðingurin av 2010 kappingini avgreiddur.

HB er fimm stig frammanfyri tey næstu. Sigrarnir hava ikki verið so sannførandi, men tað hevur givið fulla úrtøku, tá ið HB fimm tær seinastu ferðirnar er farið av vøllinum við sigrum upp á eitt mál.

Sunnudagin fer meistaraliðið at vitja í Fuglafirði, og 2. hvítusunnudag verður grannauppgerð í Gundadali millum HB og B36. Um spenningurin um FM heitið ikki skal minka heilt nógv longu tíðliga í summar, so er tað neyðugt, at ÍF og B36 gera nakað við oddaliðið.

Tvær tær seinastu ferðirnar hevur ÍF vunnið 2-0 – á Argjum og á heimavølli ímóti FC Suðuroy. Eingin ivi er um, at ÍF fer at standa seg í kappingini í ár. Sunnudagin fæst at síggja, um fuglfirðingar fara at megna nakað ímóti meistaramaskinuni úr høvuðsstaðnum.

B36 heilkiksaði ímóti Víkingi. Vinstri vongverjin tykist vera ein av stóru trupulleikunum. Símun Joensen spældi har í fýra teimum fyrstu umførunum. Nú hann er skaddur, leitar Sigfríður Clementsen eftir nýggjari loysn. Sunnudagin var Bárður Olsen á vongverjanum í 1. hálvleiki. Bárður restaði tískil á miðvøllinum, har hann gjørdi nyttu í 2. hálvleiki.

Sunnudagin fær B36 aftur vitjan úr Eysturoy. Hesa ferð verður tað NSÍ, sum við trimum sigrum í eina viku, hevur víst, hvussu skjótt alt kann endavendast. Serliga trivaligur var NSÍ sigurin mikukvøldið á Svangaskarði ímóti B68, sum tvær tær seinastu ferðirnar hevur tapt við íalt sjey málum! Sunnudagin fáa toftamenn vitjan av botnliðnum AB, sum fer at hava Heðin Stenberg í málinum, eftir at Tórður Thomsen varð rikin av vøllinum í Streymnesi.

Við sigrinum á AB slapp EB/Streymur burtur av niðurflytingarplássinum. Saman við AB er B71 undir strikuni. B71 hevur higartil bara vunnið eina ferð á heimavølli. Tvær ferðir eru gestirnir farnar av Sandi við øllum – B36 3-0 og HB 1-0. Sunnudagin fer EB/Streymur suður til Sands. Fyri vánirnar hjá B71 at standa seg í bestu deildini hava avrikini og úrslitini á heimavølli nógv at



siga. Í gjár var avrikið ímóti HB gott, men úrtøkan var eingin.

Fyri vánirnar hjá FC Suðuroy at standa seg í bestu deildini hava avrikini á Eiðinum í Vági nógv at siga. Higartil hevur úrtøkan á heimavølli verið fimm stig í trimum dystum. Avbjóðingin hesa ferð er stór. Við kærkomna sigrinum á útivølli ímóti B36 í viðføринum koma víkingarnir suður við stórum sjálvsáliti. Hjá Víkingi er luturin tann sami, sum hann er tað hjá ÍF og B36. Um tað ikki eydnast at fáa úrtøku, so er vandi fyri, at HB í uppaftur størri mun fer at sigla sín egna sjógv.

Serliga spennandi verður tað, um ÍF í tí, sum mest líkist toppdysti, hesa ferð fer at megna at knógva HB, sum higartil hevur víst seg at renna væl skjótari enn øll hini.